# SPÆLIBÓLKAR





Betri saman

Góðu foreldur

Nú fara vit at royna spælibólkar í flokkinum.

Spælibólkarnir hava til endamáls at knýta bond millum børn, sum annars ikki spæla saman og kunnu harafturat vera við til at fyribyrgja happing og læra børn at arbeiða saman.

Vit vóna, at tit fara at stuðla hesum átakinum, soleiðis at børnini kunnu fáa góðar upplivingar saman við øllum sínum floksfeløgum.

Á næstu síðu síggja tit, hvussu bólkarnir kunnu skipast, hvør bjóðar fyrst heim, og í hvørjari viku tit eiga tørn at hava spælibólk. Gott er at hava 2-3 vikur at avgreiða egnu spæliavtalu.

Um tað ikki passar hjá tykkum, ber til at býta um innanhýsis í bólkinum.

- Um tað ikki liggur fyri at hava spælibólk, bið so onkran býta um við teg. Hugsa um, at tit gera hetta til frama fyri barn tykkara og fyri øll hini.
- Bjóða inn og ger **ikki** nógv hóvasták.
- Tit kunnu hava spøl til reiðar, men brúka tey bara, um tað er neyðugt. Lat tey annars sjálvi finna útav, hvat tey vilja spæla. Í spælibólkinum nýta vit ikki skíggjar.
- ( bæði https://snar.fo/uploads/tx_tcresources/kata.pdf og https://skoleborn.dk/lege-der-bringer-sammen/ hava nógv hugskot til spæl).
- Øll børnini nýtast ikki at spæla sama spæl, men ansa eftir at øll eru við.
- Tit avgerða sjálvi, hvønn dag og nær á degnum tit hava spælibólkin. Spælibólkur er hóskandi at vara í mesta lagi 2 tímar.
- Gott at foreldur geva sær stundir til skjótan drekkamunn, við avheintan av barninum.

Spælibólkarnir

| Tíðarskeið | Bólkur 1 | Bólkur 2 | Bólkur 3 | Bólkur 4 | Bólkur 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |
| | | | | | |

3 - 5 næmingar eru í hvørjum spælibólki og bólkarnir hittast umleið eina ferð um mánaðin, alt eftir hvussu stórur hvør bólkur er. Nýggjur spælibólkur verður gjørdur 2 ferðir árliga.

Ætlanin er ikki, at spælibólkurin skal vera eitt stórt tiltak, har skipað verður fyri bowling, biografi, hestaríðing o.ø. Heldur skal miðjast eftir, at næmingarnir uppliva ein vanligan dag heima hjá hvør øðrum við hugnaligari samveru.

Hvussu hetta verður gjørt er upp til hvørja einstøku familju - um næmingarnir verða við til døgurðan hjá familjuni, ella um tey hittast tíðliga og fara heim áðrenn døgurðatíð, og

Foreldrini at næmingunum samskifta um, nær best liggur fyri at hava bólkin.

Um ikki liggur fyri hjá einari familju at hava bólkin í eitt tíðarskeið, er umráðandi, at hesi geva boðini víðari til tann næsta í røðini, so bólkurin ikki steðgar upp.

Flokslærararnir spyrja inn til spælibólkarnar við regluligum millumbili fyri at stuðla undir, at bólkarnir eru í virknir.

Við at skipa fyri mennandi og uppbyggjandi átøkum,
verður eisini slóðað fyri einum góðum
barna- og ungdómslívið.

Spælibólkar er ein skipan, har skúlin hjálpir næmingum og foreldrum at hittast nakrar ferðir árliga, fyri at læra hvønn annan at kenna heima hjá hvørjum øðrum. Tí børn og foreldur hava kanska eina mynd av hvørjum øðrum, sum í summum førum passa væl og í øðrum førum er heilt av leið.

Spælibólkar er eitt umhvørvið, har øll hava møguleika at blíva sædd og hoyrd og koma til orðanna, og er ein sera góður máti at arbeiða við trivnaði.

Best er at nýta hetta frá skúlabyrjan.

Við vón um at hetta fer at eydnast væl.
Flokstoymið

”Samumtikið snýr tað seg um at styrkja sosiala kapitalin í einstaka flokkinum“

SSP | Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi